gult cyan magenta svart


# ítróttur

Nr. 36 • mikudagur • 21. februar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo


# Gongur fram á hjá føroyingunum

FLOGBÓLTUR, KVINNUR

Eftir at føroysku kvinnurnar í donsku elitudeildini í flogbólti hava tapt nakrar dystir í januar og byrjanini av februar, hevur Frederiksberg Volley nú vunnið teir báðar seinastu dystirnar. Tann fyrri var ímóti Hvidovre seinasta týsdag, og tann seinni var sunnudagin ímóti HIK Aalborg.

Serliga dysturin móti HIK var týdningarmikil og skuldi vinnast, um føroysku kvinnurnar skuldu varðveita møguleikan at koma í semifinaluna um danska meistaraheitið.

Hjørdis Mortensen, Alvilda Ólavsdóttir, Annika Joensen og hinar á liðnum leiktu ein góðan og spennandi dyst og vóru tað betra liðið, sjálvt um tað altíð er torført at leika móti HIK í Aalborg.

**Tríggjar dystir eftir**

Frederiksberg Volley hevur nú tríggjar dystir eftir í hesum umfarinum.

Tveir dystir eru móti oddaliðnum DHG Odense, har tær ikki vænta sær nakað stig, men møguliga eitt sett ella tvey. Tann dysturin, sum føroysku leikararnir skulu vinna fyri at koma í semifinaluna, er ímóti Gentofte um tvær vikur á heimavølli.

– Vit hava góðan møguleika at vinna dystin, men alt kann henda, og Gentofte hevur spælt væl í seinastuni. So tað verður spennandi at síggja, sigur Annika Joensen í stuttari viðmerking. – Tá vit spældu ímóti Gentofte fyri nøkrum vikum síðani á teirra heimavølli, taptu vit tepurt 2-3.

Støðan er beint nú, at DHG er á odda við fullum stigatali og Holte liggur nr. 2. Holte hevur bert tapt ímóti DHG. Eingin ivi er í løtuni um, at DHG er besta liðið, og at tær koma at standa ovast á sigursskamlinum. Holte er næstbesta liðið. Hvidovre hevur einki stig og er tað vánaligasta liðið í topp 6. HIK, Gentofte og Frederiksberg liggja ájavnt við 6 stigum í part og eru sera jøvn.

Tað eru sostatt hesi seinastu trý liðini, ið skulu berjast um tvey tey seinastu plássini í topp 4.



Frá vinstru: Alvilda Ólavsdóttir, Hjørdis Mortensen og Annika Joensen við Atlanticsum stuðli

# Eitt ríkt felag

**Hjá fleiri feløgunum eru fíggjarligu sjógvarnir tungir, men hjá teimum í B36 er roknskapurin hugaligur lesnaður**

FÓTBÓLTSTØL

*Jákup Mørk*

B36 hevði aðalfund mánakvøldið, og millum evnini á hesum var framløga av roknskapi fyri farna árið. Tað er eingin loyna, at fleiri støðni í landinum sigst tað tungt at fáa endarnar at røkka saman hjá ítróttafeløgum, men hetta tykist so ikki at vera støðan hjá ástalsfelagnum.

Kassameistarin í felagnum, Kjartan Mohr, kundi vísa limunum ein roknskap, sum sýndi eitt yvirskot upp á 700.000 kr., sum annars er tað besta rakstrarúrslitið, sum felagið hevur havt.

Eisini á skuldarsíðuni stendur væl til, tí í fjør vórðu eisini seinastu avdráttirnir í 10 ára gamla felagshúsinum goldnir, soleiðis at felagið í dag er at kalla skuldafrítt.

Samlaða ogin(?) í felagnum er í dag meira enn 3,6 mió. kr., so alt í alt má sigast, at talan er um eina fyritøku, sum er væl fyri fíggjarliga.

# Tvær dupult-uppgerðir

**Fýra dystir eru á skránni mikukvøldið, og eru tað Kyndil, Tjaldur, VÍF og Neistin, sum skulu avgreiða hesar**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*

Størsti spenningurin undan hesum tykist vera, hvussu rumavikingar eru fyri, nú teir hava stykt sær enn meira um hópin við einum jugoslava av hvørjum kyni. Kvinnurnar hava verið í eldinum eina ferð, síðani hesi komu til landið, men ein dystur er kanska heldur lítið at nýta sum grundarlag.

Menninir hava fleiri ferðir verið nær við at koppa ovaru liðunum, og møguliga er nýggi leikarin júst tann eyka prikkurin í spælinum, soleiðis at teir nú av álvara kunnu gera um seg.

**Neistin í Vestmanna**

Neistaliðini bæði fara til Vestmanna í kvøld, har tvær sera truplar uppgávur móti oddaliðunum standa fyri framman.

Einki er at taka seg aftur í, at VÍF er favorittur í báðum dystunum, og úrslitini í grundspælinum benda eisini á, at so er. Tá fekk Neistin tvey stórtap við heim aftur, og hóast tað kanska eydnast teimum at forða fyri eini endurtøku av hesum, so verður tað neyvan talan um stig, sum tey bæði liðini hava heim við sær til Havnar.

**Dystirnir eru hesir:**

**Ítróttahøllin á Hálsi**

kl. 18.15

Kyndil-Tjaldur kvinnur

kl. 19.45

Kyndil-Tjaldur menn

**Ítróttahøllin í Vestmanna**

kl. 18.15

VÍF-Neistin kvinnur

kl. 19.45

VÍF-Neistin menn




Seinast tær hittust í Vestmanna, vann VÍF stórsigur á Neistanum